VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin p/f
Skansavegur 7
Postboks 1010
FO-110 Tórshavn

Tel +298 350200
Fax +298 350201
www.vagatunnilin.fo

# Frágreiðing til aðalfundin 27. juni 2005

**(fyri árið 2004)**

## 1. Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2004 havt 10 fundir og 4 fundir higartil í ár.

Nevndin hevur síðani apríl 1999 havt 5 limir. Á seinasta aðalfundi fór Heri M. Hammer úr nevndini og Dánjal T. Thomsen var nývaldur í nevndina. Hinir nevndarlimirnir vórðu afturvaldir og nevndin skipaði seg við Bergi í Garði sum formanni og Jens Kára Vilhelm sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir eru Oyvindur Brimnes og Bjarni A. Bjarnason.

Felagið hevur egna skrivstovu í leigaðum hølum á Skansavegi 7. Raksturin er skipaður í samstarvi við p/f Norðoyatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Starvsfólkini hava í 2004 verið 6 í tali umframt stjóran. Við nevndarvirkseminum er samlaða innanhýsis virksemið hjá Vágatunlinum p/f uml. 4,2 ársverk. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur og eru hesar mettar til uml. 4,1 ársverk.

Partapeningurin var seinast hækkaður á eykaaðalfundi 25. januar 2005, so at partapeningurin nú er 160,3 mió kr.

Umsetningurin var í 2004 26,3 mió kr. Av rakstrinum fóru 2,5 mió kr til rakstur av tunli og vegum, 3,9 mió kr til innkrevjing, serstakar útreiðslur til eftirlit 1,4 mió kr og 18,4 mió kr til rentur og avskrivingar. Ársúrslitið gjørdist 0,4 mió kr.

## 2. Virksemi

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

### 2.1 Tunnilsarbeiðið

Garantieftirlit var í tunlinum í jan 2004. Felagið tók tá fyrivarni fyri møguligum fjaldum manglum í tekingini í tunlinum, ið Landsverk hevur kravt eftirkannaða. Arbeitt verður saman við Landsverk og Brunaumsjónini við einum víðkaðum eftirliti fyri tekingina.

Í samsvar við tilmæli frá ráðgevum er eitt víðkað eftirlit framt av Landsverki, og eru ábendingar um at ávis strekki tørva ábøtur, men endalig niðurstøða fyriliggur ikki enn.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Byggilánið var 1. dec 2003 umlagt til endaliga fígging við 175 mió kr at rinda yvir 14 ár. Tvey tey seinastu gjøldini frá landinum á 20 mió kr vóru tøk 1. feb 2004 og 1. feb 2005 og eru goldin beinleiðis inn á lánið, sum seravdráttir.

Serstakt niðurgjald uppá 8,0 mió kr er goldið inn á lánið og avleiðingin av hesum er ein minni rentuútreiðslur uppá 0,4 mió kr um árið. Av fíggingini vóru við árslok 142 mió kr eftir at gjalda niður.

## 2.3 Ferðsla, nýtslugjald og gjaldstøð

Ferðslan hevur í 2004 verið í miðal 1015 bilar/samdøgur í mun til 880 bilar/samdøgur árið fyri. Á myndini niðanfyri er víst hvussu dagliga meðalferðslan hevur verið gjøgnum árið 2004.




Við grundarlag í ferðslu og inntøkum fyri 2003 broytti felagið nýtslugjaldið, galdandi frá 1. mai 2004, tá gjøldini fyri tunga ferðslu vóru lækkað 16% og ein mánaðaravsláttur uppá 600 kr verður latin til privatbilar, tá ið teir hava koyrt 20 ferðir innan ein kalendaramánað.

Nýtslugjaldið er seinast broytt frá 17. januar 2005, tá ið gjaldið fyri lætta ferðslu varð lækkað við uml 5 % og gjaldið fyri tunga ferðslu varð lækkað við uml. 10 %. Somuleiðis gjørdist tað møguligt at tekna árshald fyri fast mánaðarligt gjald.

Frá 1. november 2004, varð kort- og farseðla-sjálvtøkan við gjaldstøðina tikin úr nýtslu og koyra øll ferðandi, nú eftir somu breyt gjøgnum gjaldstøðina. Allir bilar uttan kubba verða skrásettir við myndatøku, og eigarin av bilinum fær rokning sendandi við postinum.

Rokningin kann sum higartil verða goldin við heimabanka og heimagreiðslu ella í peningastovni og á posthúsi, men sum ein nýggj tænasta varð avtala gjørd við Statoil og Shell um, at gjaldast kann fyri stakar ferðir beinanvegin, á teirra service-støðum.

Kubbaskipanin er óbroytt.

November og december vóru ein royndartíð. Skipanin varð eftirmett í december og varð tá avgerð tikin um at halda fram við skipanini. Skipanin hevur eisini síðani virkað nøktandi.

Í mun til kundarnar kann skipanin nú sigast at vera sjálvvirkandi. Innanhýsis arbeiðið kann tó enn gerast meira sjálvvirkandi, eitt nú við at nýta FI-kort til rokningar og gjaldingar og við elektroniskari postgongd. Arbeitt verður við at gera hesar partar av innkrevjingini so sjálvirkandi sum gjørligt.

Felagið hevur í árinum nýtt orku til burturav at greiða tær óvissurnar, sum ólagið á gjaldskipanini elvud til. Tað hevur eyðnast í stóran mun at fáa hetta í rættlag.

## 2.4 Hugsanin hjá almenninginum og viðskiftafólki

Ymiskir spurningar eru kannaðir millum fólk um alt landið og úrslitið av kanninginin er samanborið við kanningina, sum varð gjørd í fjør:

Av teimum spurdu hava 95% verið gjøgnum tunnilin, í mun til 90% í fjør. Tað er framvegis umleið 40% av teimum, sum ferðast gjøgnum tunnilin, sum eru bilførarar og talið á teimum, sum fara til flogvøllin er vaksið upp í 58% í mun 52% í fjør.

Prísurin hevur einki ella minni at siga fyri 56%, í mun til 58% í fjør, meðan hann hevur nógv ella sera nógv at siga fyri 20% í mun til 23% í fjør.

Somuleiðis eru ymiskir spurningar kannaðir millum tey, sum hava kubba hald:

Ferðandi til og frá flogvøllinum útgera 15%, í mun til 17% í fjør, meðan 28%, í mun til 37% í fjør, ferðast fyri at vitja vinir og kenningar

Viðvíkjandi nøgdsemi við tunnilsumsitingina eru 71% nøgd ella sera væl nøgd í mun til 55% í fjør – hin vegin eru framvegis uml. 30%, sum eru ónøgd við upplýsingar um nýtsluna burturav kubbahaldinum.

Eftir at kanningarnar eru gjørdar, hevur nevndin fyri fyrst gjørt sær tær niðurstøður at:

- Nøgdsemið við umsitingina er vaksið munandi, men enn er rúm fyri at gerast betur
- Flogvallarferðslan er ein sera týðandi táttur í inntøkugrundarlagnum
- Kunningin til tey, sum hava hald má gerast betur.

## 2.5 Heilsa, trygd og umhvørvi

Tilbúgvingarætlanin fyri Vágatunnili er sett í gildi. Trygdarútgerðin verður roynd hvørja viku saman við løgregluni. Arbeiðið við at fáa sjálvbodna avtalu við oljufeløgini, viðvíkjandi nær teirra flutningur gjøgnum tunnilin fer fram, er fyri fyrst lagt niður, við tað at myndugleikarnir arbeiða við skipan hesum viðvíkjandi.

20. apríl 2005 var venjing í tunlinum, sum av fyriskiparunum varð mett at vera nøktandi. Úr niðurstøðuni í venjingarfrágreiðingini kann nevnast:

- Samlaða myndin var nøktandi, serliga gjørdist tað góða samstarvið millum allar luttakararanar avgerandi, tá ið teir ymsu trupulleikarnir skuldu loysast.

- Tað er tó ynskiligt, at sløkkiliðsfólkini og serliga leiðararnir verða betur fyrireikaðir til at meta um ymsu støðurnar og gerast betri til at raðfesta arbeiðið hjá fólkinum í fyrsta parti av einum átaki.

- Hetta kann bert røkkast við meiri útbúgving og fleiri venjingum, sum eru so natúrligar sum til ber. Hetta er galdandi yvirhøvur og ikki serstakt fyri tunnilin.

## 2.6 Frí ferðsla

Eins og í 2003, var, ársdagin fyri at tunnilin var latin upp fyri ferðslu, opið fyri ferðslu, uttan at nýtslugjald var kravt. Vinnulívið í Vágum nýtti hetta høvi til at gera vart við seg . Av tí, at nevndin metti at hetta var so mikið væleydnað og í samsvar við ætlanirnar um marknaðartiltøk, varð gjørt av, at tað

fyri fyrst verða 4 fastir dagar um árið, har tað er frítt at ferðast gjøgnum tunnilin. Dagarnir verða lagdir hvør í sínum ársfjórðingi í samráð við vinnuna í Vágunum.

## 2.7 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er sum nevnt skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastusavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Á seinasta aðalfundi varð borið uppá mál at útlicitera sum mest av rakstrinum hjá felagnum. Skipað er fyri prekvalifisering av arbeiðstakarum til at bjóða uppá at standa fyri umsiting av tekniska rakstrinum av tunlinum. Boðið verður út í næstum millum teir sum vórðu góðkendir.

Endaliga umleggingin av gjaldskipanini verður framd og má vera liðug áðrenn hesin parturin av rakstrinum er egnaður at bjóða út.

# 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina. Sum ásett í anlegslógini er felagnum játtað tilsamans 160,3 mió kr til verkætlanina.

## 3.1 Lóggeva um áminningargjald

Felagið hevur við heimild í anlegslógini ásett nýtslugjald fyri at ferðast gjøgnum tunnilin. Hendan heimildin røkkur ikki til at áseta áminningargjald. Áminningargjaldið er av stórum týdningi fyri at eggja kundunum til rættstundis gjalding. Mælt verður tí til, at neyðugu lógarbroytingarnar verða gjørdar, soleiðis at ein greið heimild verður fyri at áseta og krevja inn áminningargjald.

## 3.2 Generell útbúgving og tilbúgving í færri og størri eindir

Felagið hevur ísv. gerð av tilbúgvingarætlan luttikið í útbúgving av fólkið hjá sløkkiliðunum í avvarðandi kommununum í handfaring av neyðstøðu í tunlum, eins og skipað er fyri venjing í tunlinum. Niðurstøðan eftir venjingina vísir, at tann parturin sum hevur beinleiðis við tunnilin at gera er nøktandi, meðan neyðugt er við meiri leiðsluútbúgving og venjing av generellum tilbúgvingarligum slag, ið ikki beinleiðis snýr seg um tunlar. Mælt verður tí til, at skipað verður fyri neyðugu útbúgvingini, eins og mælt verður til at tilbúgvingin verður savnað í færri og størri eindir, har møguleiki er fyri at hava útbúgvið fólk í starvi burturav.

# 4. Rakstrar og íløguætlan fyri komandi árini

Høvuðstølini í rakstrarætlanini fyri 2005 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **2005**<br>**mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 24,5 |
| Rakstur tunnil og vegir | -2,2 |
| Rakstur innkrevjing | -4,2 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 18,1 |
| | |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -12,4 |
| Fíggjarpostar | -6,2 |
| **Ársúrslit** | -0,5 |
| | |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 12,4 |
| Avdráttur | -6,0 |
| **Likviditetsbroyting** | 5,9 |

Íløgurnar hava í 2004 verið 2,2 mió kr. Støðisognin er við árslok uml. 282 mió kr. Bert smærri íløgur væntast í 2005, tó er ætlanin at heilautomatisera gjaldstøðina fyri 1,7 mió kr.

# 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- at felagið hevur bøtt um úrslitið í mun til 2003
- endaliga avkláringin viðvíkjandi teking av tunlinum er ikki klár, men nærkast tó
- raksturin í 2004 hevur givið møguleika fyri einum serstakum niðurgjaldi av láninum
- ferðslan er økt í 2004
- prísbygnaðurin er komin í eina fasta legu, eins og prísirnir eru munandi lækkaðir
- uppgávan ið nú liggur fremst er at effektivisera raksturin við at troyta møguleikarnar fyri elektroniska innkrevjing, gjalding og bóking
- nøgdsemið viðvíkjandi tunnilsumsitingin er munandi betur enn í 2003
- dentur verður framvegis lagdur á trygd í tunlinum og avvarðandi partarnir luttaka nærlagdir í venjingum
- dagar við fríari ferðslu, hava víst seg at vera ein góður liður í at marknaðarføra tunnilin.

Tórshavn 27. juni 2005

Bergur í Garði, form.

Jens Kári Vilhelm, næstform.

Oyvindur Brimnes

Bjarni A. Bjarnason

Dánjal T. Thomsen

/ Dávid Reinert Hansen, stjóri